

www.oljan.fo

**Jan Müller** 19 - 04 - 2013

# Enn ein oljuútbygging vestan fyri Hetland

Enn ein útbygging av oljukeldu vestan fyri Hetland er við at koma undir land. Talan er um oljukelduna Solan, sum liggur í ein sunnan og vestan frá longu kendu oljuleiðini Schiehallion. Tað er oljufelagið Premier Oil, sum er fyristøðufelag og er júst gjørdur sáttmáli við stóru norsku fyritøkuna Aker Offshore at standa fyri parti av útbyggingini. Tað verður arbeitt við at byggja út við einum minni palli, sum kann verða ómannaður stóran part av tíðini. Hann hevur so samband við framleiðslueindir á havbotninum. Oljan verður goymd í einum stórum tanga og síðani flutt víðari til eina av oljuhavnunum í grannalagnum við serstøkum tangabátum. Fyrsta oljan frá hesi nýggju oljukelduni vestan fyri Hetland er ætlað til seinnu helvt av 2014 og verður framleiðslan umleið 24.000 tunnur av olju um dagin. Keldan er mett at goyma 40 mill. tunnur av olju. Tað verður boripallurin WilPhoenix, sum fer at bora fyrstu útbyggingarbrunnarnar í næstum.